# Ríkisfelagsskapurin er ein




- Vit skulu ikki grava okkum niður í eina holu. Vit skulu lata eygu og hjørtu upp og stíga fram, og eg haldi, at vit skulu loysa og skipa okkum sum tjóð beint nú. Eg eri 100% sannførdur um, at Føroyar saktans kunnu standa á egnum beinum, segði Petur Pólson

Mynd: Vilmund Jacobsen

**- Hjarta, hugburður og sál eru týdningarmiklari enn ein full pengamappa. Vælferðin er í grasinum og moldini. Har er loysingin, og har er frælsi. Fáa vit hetta inn í hjørtuni á okkum, fer tað at ganga – sjálvt, um vit eru føroyingar, segði Petur Pólson, tá hann hugleiddi um mentan á flokstingi Tjóðveldisins**

HUGLEIÐING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var áhugavert at lýða á orðini hjá Peturi Pólson í Skálavík seinasta leygardag, tá lærarin, yrkjarin og tónleikarin á sín sermerkta hátt hugleiddi um føroyska mentan. Hann segði tingini við orðum, sum vit sjáldan hoyra á røðarapalli, og hann ballaði einki inn, men tosaði út frá livrini, sum vit plaga at siga.

Petur byrjaði sína framløgu á ein forvitnisligan og serstakan hátt, soleiðis at tú noyddist at lýða tað, sum aftaná fór at koma.

- Í 1992 keypti ein sambandsmaður húsini, sum pápi mín bygdi. Húsini fingu danska múrsteinslitin og konan, sum nú flutti inn, gekk í túninum við hundinum. Danskir litir og danskur lívsstílur ráddi nú í hesum húsum, har eg sum ungur hevði mína fyrstu avgongu.

## Heroin-sproyta

Petur segði, at fyri summi er ríkisfelagsskapurin andadrátturin, men sjálvur vildi hann siga, at ríkisfelagsskapurin er ein heroinsproyta.

- Men ríkisfelagsskapurin er ikki bara heroin. Hann er eisini tað, sum hoyrir upp í at brúka vandamikla evnið – tað at fáa fatur á tí, at hava ráð til tað, at fylla seg við tí og bedøva seg. Høvuðsorsøkin til, at so fá koma burtur úr heroin-misnýtslu er, at tað er so trupult at gerast leysur av evninum. Heroin kann drepa, men tú kanst eisini doyggja við at gerast edrúur, sum hann tók til.

Og Petur helt fram:

- Fyri at kunna gevast við nøkrum, tú ert bundin at, noyðist tú at síggja longur enn bara til tingið sjálvt. Hetta geldir ikki bara heroin, men alt, sum fólk kunnu vera bundin at. Tú